# Løgmaður sent samkenslufjarrit



Løgmansskrivstovan sigur á heimasíðu síni hósdagin, at løgmaður hevur sent samkenslufjarrit til grannalond okkara, sum hava mist borgarar orsakað av flóðalduni í Fjareystri.

Løgmaður hevur sent samkenslufjarrit til Svøríkis, Noregs, Danmarkar og Finnlands, ið øll hava mist borgarar í hesum ófatiliga sorgarleiki, boðar Løgmansskrivstovan frá.

Eisini hevur Føroya løgmaður sent samkenslufjarrit til stjórnirnar í londunum í Fjareystri, ið eru so meint rakt av vanlukkuni. Stjórnarvaldini í India, Sri Lanka, Indonesia, Tailandi, Maldivoyggjum, Malaisia, Bangladesj, Myanmar og Somalia hava fingið samkenslufjarrit úr Tinganesi, stendur at lesa á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni.

ej




**Ognar- og stjóraskifti á Hotel Hafnia**

**MÓTTØKA**

Í sambandi við stjórnarskifti á Hafnia 1. januar 2005 verður bjóðað til móttøku

**Fríggjadagin tann 7. januar 2005 frá kl. 15-18**

Johan, M.C. & Martin Restorff vilja nýta høvið at takka øllum hjartaliga fyri trúfesti og gott samstarv farnu árini.

Nýggju stjórarnir - Birna Gaard og Ása Johnsdóttir gleða seg at taka upp framhaldandi gott samstarv.

Verið hjartaliga vælkomin

Johan, M.C. & Martin
Birna & Ása

**P/F Hotel Hafnia**
**Tel 31 32 33 · Fax 31 52 50**
**hafnia@hafnia.fo**



**ÚTSØLA**

**BYRJAR FRÍGGJADAGIN 7. JANUAR 2005 KL. 08.00**

**1/2 PRÍSUR**

**(er ikki galdandi fyri NOA NOA MINIATURE)**

**NOA NOA**®

Tróndargøta 26-27
tel 318200
fartel 218199

**NB: Fríggjadagin 7. januar hava vit opið til *kl. 20.00***